# Ferrari – *heimsins fremstu sportsbilar*




**Eingin av rasara- ella sportsbilunum í øllum heiminum hevur nátt somu málum sum Ferrari, hvørki í søguligum baksýni ella í dag, har teir t.d. eru totalt dominerandi í Fomerl 1 koyring og gera heimsins fremstu sportsbilar**

FERRARI
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Stovnarin av Ferrari, Enzo Ferrari (1898-1988), var á ein hátt ein einari í søguni hjá bilídnaðinum.

Hann var ikki, eins og nógvir aðrir bilfabrikantar, verkfrøðingur, mekanikari ella handilsmaður, men hann hevði ein brennandi hug til motorsport.

Longu sum 22 ára gamal kom hann í starv við Alfa Romeo, har hann hevði ein týðandi leiklut í menningini av bilverksmiðjuni.

Í 1929 stovnaði hann »Scuderia Ferrari Modena«, har hann savnaði eitt lið av teimum bestu kendu rasarakoyrarunum innan italska motorsportin til kappkoyring í bilum frá Alfa Romeo.

Í 1940 stovnaði Enzo Ferrari fyritøkuna »Auto Avio Costuzioni Ferrari«. Fyrsti bilurin var Ferrari 815, hann hevði 8 syl. og 1500 cc. Í 1943 flutti Ferrari verksmiðjan frá Modena til Maranello.

Enzo Ferrari vildi ongantíð gera kompromis við nakran








*Hendan Ferrari 308 GTS/i eigur Alti Simonsen í Hoyvík. Óli Mouritsen í Havn keypti bilin í USA í 1984 og flutti hann til Føroyar í 1986 Bilurin hevur 3.0 litur V8 motor við umleið 250 hk. Motorurin stendur upp á tvørs í miðjuni á bilinum. Ferrari 308 GTSi kom fyrstu ferð á marknaðin í 1975, og teir vórðu gjørdir til 1984*